# Elektrikari til SEV

**Ert tú útbúgvin elektrikari?**

**Hevur tú evnir og áræði at seta teg inn í framkomna tøkni?**

**Klárar tú at arbeiða undir trýsti í avmarkaða tíð?**

**Kanst tú arbeiða sjálvstøðugt og taka røttu avgerðina tá ið á stendur?**

**Kundi tú hugsað tær eitt starv sum elektrikari á størsta elverkinum í landinum?**

Svarar tú ja til hesar spurningar, er tað kanska brúk fyri tær á veikstreyms- og teknikkdeildini hjá SEV.

Tú verður partur av einum toymi, sum hevur ábyrgd av eltekniska útbúnaðinum á elverkunum og koblingsstøðum kring landið. Tann ið settur verður fer at verða knýttur at Sundsverkinum.
Sjálvandi hevur tú góð samstarvsevnir, og dugir at málbera teg bæði í skrift og talu á føroyskum og donskum.

**Tú hevur fyrimun um tú:**
- Kennir nakað til PLC og stýringar sum heild.
- Kennir til instrumentering og mátiteknikk.
- Dugir at fáast við teldu.
- Er næmur, vælgerandi og álítandi.

**Um tú hevur førleikarnar kunnu vit bjóða tær:**
- Eitt sera fjølbroytt arbeiði, har tú til tíðir fer at arbeiða sjálvstøðugt
- Eitt arbeiði sum tú sjálvur er við til at tilrættaleggja.
- Møguleika fyri bæði persónligari og fakligari menning.
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi har álit og hjálpsemi er ein dygd.

**Lønin:**
Lønin er grundað á handverkaraløn við einum ískoyti upp á 8% umroknað til eina fasta mánaðarløn.

**Elfelagið SEV:**
Felagið, tú fer at arbeiða hjá, er interkommunala Elfelagið SEV, sum tekur sær av at streymveita allar Føroyar frá og við elframleiðsluni og til endaliga brúkaran. SEV hevur uml. 150 fólk í starvi, og á deildini har tú fer at arbeiða, eru frammanundan 3 verkfrøðingar og 3 elmontørar.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Terja Nielsen, deildarverkfrøðing ella Finn Jakobsen, deildarstjóra á telefon 346800.

Umsóknir skulu saman við avritum av prógvum og møguligum ummælum sendast Elfelagnum SEV, postrúm 319, FO-110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi 2. januar 2007.

Tórshavn, tann 5. december 2006

**Elfelagið SEV**

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Lesið internet Sosialin !






## Leyst starv

**Pedagogur til Dagstovnin á Velbastað**

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 30 til 40 tímar um vikuna at byrja 15. februar ella eftir nærri avtalu.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknir saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Dagstovninum á Velbastað, Norðuri á Heyggi 55, FO-176 Velbastaður, í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. desember 2006.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Bjarna Clementsen, stovnsleiðara, tlf. 218132.

**Lesið meira um starvið á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

# Ársins Jóladansur

í Mentanarhúsinum · leygarkvøldið 16 desember



# FRÆNDUR

tit kenna hittini.....og komi og syngið við

150,-

**Bussamband:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Av Toftum | kl 23.30 | tekning | tlf 505220 |
| Av Strondum | kl 23.30 | tekning | tlf 505220 |
| Úr Havn | kl 22.30 | tekning | tlf 595959 |
| Úr Klaksvík | kl 23.00 | tekning | tlf 218714 |